## Rás 2 við finalum

Rás 2 fer at senda beinleiðis frá øllum fýra FM-finaludystunum, sum verða á Eiði í morgin og sunnudagin. Frásøgumaður verður Hilmar Jan Hansen og aftrat sær sum viðmerkjara, hevur hann Suna Hansen. Leygardagin byrjar frásøgnin klokkan 13.45 og sunnudagin klokkan 14.45.



## Flyta flogbóltsgalla

Árliga gallaveitslan hjá flogbóltinum, sum upprunaliga skuldi verða á Hotel Norð á Viðareiði leygarkvøldið 27. mars, er nú útsett til leygarkvøldið 10. apríl. Ein orsøk til tað er, at SÍ hetta sama kvøld hevur ársveitslu, og av tí at sørvingar plaga at vera væl umboðaðir, valdu fyrireikararnir heldur at flyta gallaveitsluna. Skráin er framvegis tann sama, at borðreitt verður við trimum rættum og at hæddarpunktið á kvøldinum óivað verður, tá ársins bestu spælarar verða heiðraðir. Tilmeldingin til gallaveitsluna fer fram á gallaveitslan2010@gmail.com, og eisini hevur veitslan sín egna bólk á Facebook, sum eitur Galla 2010.

# VÍF kann taka finalusessin

**Um vestmenningar vinna sín dyst sunnudagin, eru teir í FM-finaluna ímóti Neistanum, tí liðið er bara eitt stig frá at taka finalusessin**



Hilmar Jan Hansen

Næstsíðsta umfar í Atlantic Airways-kappingini er á skránni sunnudagin, og hetta kann gerast umfarið, ið avger kappingina um at sleppa í FM-finaluna, har Neistin hevur staðið og bíðað tað mesta av vetrinum. Sjálvandi kann tað kiksa hjá vestmenningum, men framvegis hava teir bestu kortini á hondini.

VÍF hevur vunnið fýra dystir á rað og er trý stig framman fyri øll hini fýra liðini, sum liggja í einum stórum trunka. Megnar VÍF at vinna sín dyst, sum er á heimavølli ímóti KÍF, er leyst og liðugt, tí so er liðið framvegis tey trý stigini frammanfyri – og bara tvey stig eru eftir at spæla um.

Marran hjá vestmenningum er sjálvandi, at teir tapa í Vestmanna, tí so kunnu »í ringasta føri« trý av hinum liðunum koma upp at anda VÍF í nakkan undan seinasta umfarinum. Her eru so fleiri teoretiskir møguleikar, men tað stutta av tí langa er, at avgerðin liggur í hondunum á vestmenningum sjálvum sunnudagin.

Eingin ivi man vera um, at í dystinum millum H71 og Kyndil verður spælt fyri lívinum, tí skuldi VÍF tapt, so ræður snøgt sagt um at vinna hjá báðum pørtum, skal nøkur vón vera eftir um at røkka finaluplássið. Ein javnleikur beinir í øllum førum fyri møguleikanum hjá báðum.

Og í triðja dystinum hevur StÍF ta ótakksomu uppgávu at vitja Neistan, sum á heimavølli neyvan letur nakað lættliga frá sær. Neistin hevur ikki brúk fyri stigunum, tí teimum er ríkiligt til av frammanundan, men fyri moralin er tað sjálvandi gott at vinna, nú teir bláu fyrireika seg til finaluna.



Vinna vestmenningar á kollfirðingum sunnudagin, er finaluplássið tryggjað
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

## Síðsta sprell í Sunset

Longu langt síðani er greitt, at tað verða Stjørnan og Tjaldur, sum skulu spæla FM-finalurnar hjá hondbóltskvinnunum, so tí er hetta seinasta umfarið í Sunset-kappingini eitt, ið bara skal fáast frá hondini.

Oddaliðið, Stjørnan, skal á útivølli spæla ímóti VB, sum endar aftast, men kanska ikki flytur niður kortini, um so er, at feløgini á limafundi í morgināri taka ta avgerð, at besta kvinnudeildin skal víðkast.

Tjaldur, sum er næstfremst, skal á útivølli spæla ímóti VÍF, sum helst er frískasta íkastið í kappingina í vetur og eitt nú kom í steypafinaluna. Triði dysturin verður millum Neistan, sum longu hevur tryggjað sær bronsuna, og StÍF, sum endar næstaftast.

**hil**

# Bragdið í bakhøvdinum

**Føroysku fótbóltsmenninir skulu sunnudagin royna at endurtaka bragdið frá í fjør, tá tað fyri fyrstu ferð eydnaðist at koppa íslendingum í granna-uppgerð**



Hilmar Jan Hansen

Tá føroyska manslandsliðið í fótbólti sunnudagin 22. mars í fjør vann 2-1 á Íslandi í vinardysti í Kórinn-høllini í Kópavogi, var tað fyrsti føroyski sigurin á íslendingum nakrantíð. Eisini var tað fyrsti sigurin hjá landsliðnum í hálvtfimta ár, so í allar mátar var hetta eitt kærkomið úrslit.

U21-landsliðsvenjarin, Heðin Askham, sum átók sær uppgávuna at stjórna føroyska liðnum henda eina dystin, megnaði tað, ið eingin av øllum undanmonnunum hevði megnað. Nú er tað so Brian Kerr, ið skal royna seg, samstundis sum hetta verður hansara fyrsti dystur ímóti íslendingum sum føroyskur landsliðsvenjari.

Dysturin verður aftur hesa ferð í Kórinn-høllini í Kópavogi, og hann byrjar sunnudagin á miðdegi. Har fæst so at síggja, um tað ber til at endurtaka góða úrslitið frá í fjør, men lítið man vera at ivast í, at bæði spælarar og onnur munnu bera bragdið í bakhøvdinum.

Teir 20 spælararnir, sum eru við í føroyska landsliðshópinum, eru Fróði Benjaminsen (HB), Egil á Bø (EB/Streymur), Atli Danielsen (Roskilde), Dánjal Davidsen (EB/Streymur), Jóan Símun Edmundsson (Newcastle), Andrew av Fløtum (HB), Atli Gregersen (Víkingur), Einar Hansen (NSÍ), Meinhardt Joensen (B36), Bogi Løkin (Frem), Vagnur Mohr Mortensen (HB), Christian Restorff Mouritsen (B36), Gunnar Nielsen (Manchester City), Jónas Þór Næs (Frem), Bárður Olsen (B36), Súni Olsen (Víkingur), Jann Ingi Petersen (NSÍ), Rógvi Poulsen (HB), Símu n Samuelsen (HB) og Høgni Zachariasen (ÍF).



Føroyskur fagnaður í Kórinn-høllini eftir 1-0 málið í fjør, tá Føroyar við 2-1 sigrinum fyri fyrstu ferð nakrantíð vunnu á íslendingum
Mynd: Kjartan Þorbjörnsson/Morgunblaðið

## Dystir um vikuskiftið

### Flogbóltur

**FM-finalur á Eiði**
20/03 14.00 SÍ-TB (kvinnur)
20/03 16.00 SÍ-Mjølnir (menn)
21/03 15.00 TB-SÍ (kvinnur)
21/03 17.00 Mjølnir-SÍ (menn)

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**
20/03 14.00 VÍF-Tjaldur
20/03 15.00 VB-Stjørnan
21/03 14.30 Neistin-StÍF

**Atlantic Airways-kappingin**
21/03 16.00 VÍF-KÍF
21/03 16.00 H71-Kyndil
21/03 16.00 Neistin-StÍF

### Fótbóltur

**A-landsdystur í Kópavogi**
21/03 12.00 Ísland-Føroyar